Í trimum pørtum prentar Sosialurin eina greinarøð, ið er høvuðsuppgávan hjá nýútbúnu journalistunum, Ingrid Bjarnastein og Tóru Effersøe Mortensen, sum í summar tóku prógv við Journalistháskúlan í Århus. Høvundarnir hava tikið upp eitt evni, sum ongantíð rættiliga er lýst í føroyskum fjølmiðlum. Tær báðar hava valgt ein frásøguhátt, ið á enskum kallast »New Journalism«. Fyrsti partur varð prentaður í gjár, og her kemur annar partur


*Ingrid Bjarnastein*


*Tóra Effersøe Mortensen*

## Annar partur:

# Fangað í einum glansbílæti

**Ein ræðuligur illgruni verður til veruleika og endavendir lívinum hjá eini mammu. Og spakuliga syndrast dreymurin um eina fullkomna familju**

KYNSLIGUR MISNÝTSLA

*Ingrid Bjarnastein og Tóra Effersøe Mortensen*

Maria er skakað, nú loyndarmálið hjá dóttrini er komið fram. Nú skilir hon betri atburðin hjá Lisu, og øll tey tekin, hon hevur sent. Hennara framferðarháttur hevur verið eitt róp um hjálp, men Maria hevur ikki hoyrt tað. Hon er kedd og vónbrotin, men á ein hátt kennir hon eisini ein lætta.

Sjálvt um ákærurnar hjá Lisu eru grovar, so velur Maria at trúgva henni. Men hon vil eisini trúgva Kim, tá hann sigur, at hann svav, tá tað hendi. Maria er vís í, at við hjálp frá eitt nú samkomuni, kunnu tey loysa trupulleikarnar sum ein familja.

Í eini telefonsamrøðu fortelur Maria Onnu tað, ið hent er. Tað kemur ikki óvart á vinkonuna, men hon merkir skjótt, hvat Maria heldur.

"Anna, eg veit væl, hvat tú heldur. Men eg trúgvi Kim," sigur Maria. Hon fortelur eisini, at hon velur familjuna, tí hon so inniliga ynskir, at tey skulu koma yvir tað, ið hent er.

Anna er ikki samd við vinkonuni, men Maria broytir ikki meining.

Í samkomuni og hjá manninum fær hon stuðul. Tey eru sannførd um, at trúgvin á Gud kann fáa familjuna á rættkjøl.

Maria fortelur ikki Benjamini og Mortani, hvat hent er. Hon er ikki bangin fyri, at pápin kann hava gjørt teimum nakað, og hon vil ikki hava, at teir verða blandaðir uppí trupulleikarnar.

Vikurnar ganga. Og hjá familjuni líkist dagurin sær sjálvum. Lisa tosar aftur við pápa sín, og Maria heldur, tað er tí, dóttirin er glað fyri, at sannleikn er komin fram. Hvørki Benjamin ella Mortan vísa tekin um at vera ávirkaðir av tí ruðuleika, ið hevur valdað í familjuni í so langa tíð.

Men hjá Mariu lekir tíðin ikki øll sár. Støða hennara verður verri og verri fyri hvønn dag, ið fer. Hon hevur umhugsað at uppgeva familjuna og flýggja við børnunum. Hon vil burtur frá Kim.

### Ársins longsti dagur

Meðan Havnin kámast í baksspeglinum koyrir tann blái bilurin eftir Oyggjarvegnum. Summarið er nú komið og sólin skínur oman og niðan hendan dagin. Bilurin sker seg gjøgnum harðrendu náttúruna við leið móti Mjørkadali.

Maria er á veg í føðingardag hjá bróðursyni sínum, sum býr á bygd. Hon er einsamøll í bilinum; Kim er eftir í Havnini. Benjamin og Mortan eru fyrr um dagin farnir við ommu síni. Og Lisa er úti saman við floksfeløgunum, tí skúlin er liðugur.

Umgird av høgum fjøllum setur Maria kós ímóti lítlu bygdini, har bróður hennara býr. Dagurin hevur verið langur. Hon og Kim hava verið til prógvahandan í skúlanum, nú Lisa er liðug við tíggjunda flokk.

Síðstu dagarnir er hon vorðin alsamt meira í iva. Hon megnar ikki longur at halda familjuni saman, og tí hevur hon ráðført seg hjá einum lifecoach í Klaksvík.

Maria koyrir framvið vøkru grønu fjallasíðunum, tá telefonin brádliga ringir. Tað er konan hjá bróður Kim, sum spyr, um tað er satt, at Lisa er blivin krenkað av pápa sínum.

Samrøðan fær Mariu at falla púrasta í fátt. Sannleikin samsvarar ikki longur við hennara dreym. Nú sær hon glansbílætið detta sundur.

Ein ræðuligur ótti kemur á hana og í vónloysi ringir hon til pápa sín.

"Eg fái ikki andað! Eg eri við at kvalast," sigur hon við gráturødd.

Pápi hennara er heima. Hann hevur havt ein langan arbeiðsdag og hevur tí ikki havt stundir at vera við í føðingardegnum hjá abbabarninum. Tá hann hoyrir dóttrina, verður hann kløkkur, men hann tykist róligur.

"Hvar ert tú?" spyr hann.

"Eg veit ikki," svarar Maria.

"Hvat sært tú?" spyr hann so.

Maria greiðir frá, at hon sær Kollafjørð, og skjótt veit pápin, hvar hon er. Maria steðgar bilinum.

Hon roynir at vera rólig, men megnar ikki at stýra kenslunum. Hon veit, at pápabeiggi hennara er á veg, tað hevur pápi hennara lovað.

Løtu seinni kemur pápabeiggin. Hann setur seg inn í bilin undir liðina á Mariu.

"Eg eri farin frá Kim," sigur hon og tárini trilla niður eftir kinnunum.

Meira tos verður tað ikki til, fyrr enn bróður Mariu kemur. Hann hevur tosað við pápa teirra og veit tí, hvat hent er.

Jens parkerar bilin, og pápabeiggin koyrir víðari móti heimbygd síni. Maria fer yvir til bilin hjá Jensi og setur seg inn. Hon

*Framhald á næstu síðu*


*Maria er kedd og vónbrotin, og sjálvt um ákærurnar frá dóttrini móti pápanum eru grovar, so velur hon at trúgva henni*
*Modellmynd: Jens Kristian Vang*